TRYGD

# HÁLVÁRSFRÁSØGN H1 2019

# INTERIM REPORT H1 2019

## Innihaldsyvirlit / Contents

5 ára yvirlit / Five year summary ........ 2
Frágreiðing um fyrra hálvár 2019 ........ 3
Eginpeningur og solvensur felagsins ........ 4
Útlit fyri seinna hálvár 2019 ........ 4
Aðrar upplýsingar ........ 5
English section ........ 6
Management's report H1 2019 ........ 6
The company's capital structure and solvency ........ 7
Outlook for the remaining of 2019 ........ 7
Other information ........ 8
Roknskapartøl / Financial Statement ........ 9
Notur / Notes ........ 12
Nota 1 Nýttur roknskaparháttur ........ 12
Grannskoðan ella gjøgnumgongd ........ 12
Note 1 Basis of preparation of the H1 financial statements ........ 13
Audit and review ........ 13
Leiðsluátekning ........ 14
Statement by the management ........ 14

P/F Trygd Tryggingarfelag · Oknarvegur 5 · Postboks 44 · FO-110 Tórshavn · 358 100 · www.trygd.fo

TRYGD

# 5 ára yvirlit / Five year summary

## Gongdin seinastu 5 árini / 5-year financial highlights

| **Høvuðstøl / key figures**<br>**DKK 1.000** | **30.06.2019** | **30.06.2018** | **30.06.2017** | **30.06.2016** | **30.06.2015** | **31.12.2018** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld inntøkur, brutto / Gross premiums earned | 60.741 | 56.351 | 50.028 | 45.688 | 44.169 | 115.131 |
| Bruttoskaðaendurgjøld / Gross insurance claims | -36.205 | -38.372 | -33.219 | -21.781 | -30.787 | -72.480 |
| Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi / Total insurance operating expenses | -13.043 | -12.483 | -11.978 | -10.428 | -9.642 | -24.624 |
| Úrslit av endurtrygging / Profit/loss on business ceded | -3.348 | -4.074 | 196 | -3.098 | -2.665 | -9.086 |
| Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Technical interest, net of reinsurance | -97 | -56 | -103 | -68 | -95 | -234 |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **7.510** | **1.848** | **4.923** | **10.312** | **980** | **8.707** |
| Íløguavkast eftir trygg. tekniska rentu /<br>Investment yield after tech. interest rate income | -205 | -298 | 133 | 807 | -342 | -504 |
| **Úrslit / Net profit** | **5.990** | **1.271** | **4.146** | **9.118** | **523** | **6.716** |
| Úrslit av endurgjaldsavsetingum fyri egna rokning /<br>Run-off result from net claims provisions | 1.784 | 1.215 | 2.848 | 6.304 | 2.545 | 1.268 |
| **Fíggjarstøða / Balance sheet** | | | | | | |
| Tryggingartekniskar avsetingar tilsamans / Total technical provisions | 103.379 | 97.360 | 94.048 | 72.856 | 77.185 | 88.150 |
| Tryggingaráogn tilsamans / Total Technical assets | 3.455 | 3.888 | 13.277 | 846 | 512 | 2.399 |
| Eginogn tilsamans / Total Equity | 82.019 | 74.748 | 72.054 | 76.762 | 63.683 | 80.636 |
| Áogn tilsamans / Total Assets | 194.502 | 181.079 | 174.085 | 160.437 | 158.543 | 177.810 |
| **Lyklatøl / Ratios** | | | | | | |
| Bruttoendurgjaldsprosent / Claim ratio | 59,6 | 68,1 | 66,4 | 47,7 | 69,7 | 63,0 |
| Bruttokostnaðarprosent / Gross expense ratio | 21,5 | 22,2 | 23,9 | 22,8 | 21,8 | 21,4 |
| Nettoendurtryggingarprosent / Net reinsurance ratio | 5,5 | 7,2 | -0,4 | 6,8 | 6,0 | 7,9 |
| Combined Ratio / Combined Ratio | 86,6 | 97,5 | 90,0 | 77,3 | 97,6 | 92,2 |
| Operating Ratio / Operating Ratio | 86,9 | 97,7 | 90,3 | 77,5 | 97,8 | 92,4 |
| Lutfalsligt úrslit av endurgjaldsavsetingum /<br>Relative Run-off gains/losses | 4,1 | 2,8 | 3,9 | 12,5 | 6,7 | 4,0 |
| Eginognsavkast í prosent / Return on Equity | 7,7 | 1,6 | 5,9 | 12,6 | 0,8 | 8,7 |

5 ára yvirlit er gjørt sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Við virknað frá 1. januar 2019 er nýggja kunngerðin sett í gildi. Samanberingartølini fyri 2018 eru tillagað nýggju kunngerðini. Tað hevur ikki verið gjørligt at gera tillagingar í samanberingartølunum fyri árini 2015-2017.

Five Year Summary is rendered in accordance with Executive order No. 4 from 27th of June 2018 on annual reports for insurance companies and financial holding companies. From 1 January 2019 the new Executive order came in to effect. Comparative figures for 2018 are adjusted in accordance with changes in the new Executive order. It has not been possible to adjust main- and key ratios regarding the years 2015-2017.

TRYGD

## Frágreiðing um fyrra hálvár 2019

Gongdin í fyrra hálvári í 2019 hjá Trygd hevur verið góð, borið fram av hækkandi inntøkum.

Úrslitið áðrenn skatt var 7,3 mió. kr., og tað er sum væntað væl betri enn sama tíðarskeið í fjør. Til samanberingar var úrslitið í fyrra hálvári 2018 1,5 mió. kr. áðrenn skatt. Tað úrslitið var serliga merkt av stórum einstøkum skaðum.

Tryggingartekniska úrslitið var 7,5 mió. kr. í fyrra hálvári samanborið við 1,8 mió. kr. í sama tíðarskeiði í 2018. Tað vóru serliga stóru einstøku skaðarnir, ið settu sín dám á gongdina í 2018.

Trygd hevur verið fastur viðleikari at tryggja føroysku húskini síðani 1998, men seinnu árini hevur Trygd eisini verið fyri stórum vøkstri á vinnuliga økinum. Lutfalsliga størsti vøksturin í inntøkunum hjá Trygd í fyrra hálvári stavar frá vinnuni og almennum stovnum.

Góða gongdin í føroyska samfelagnum sæst framhaldandi aftur í virkseminum hjá Trygd. Her er ítøkiliga talan um framhaldandi stóra sølu av nýggjum bilum, ymiskt økt virksemi í sambandi við vaksandi ferðavinnuna sum eitt nú leigubilar og so jaliga gongdin á sethúsamarknaðinum, ið ber inntøkurnar fram.

Bruttotryggingargjøldini hjá Trygd hava verið støðugt vaksandi seinastu árini. Samanborið við sama tíðarskeið í fjør eru tey hækkað við 5,2 mió. kr. og eru sostatt nú 75,3 mió. kr. í mun til 70,1 mió. kr. fyrra hálvár í 2018.

Útreiðslurnar í sambandi við skaðar eru lægri enn fyrra hálvár í 2018. Hetta er ein lækking í serliga skal síggjast í mun til stóru einstøku skaðarnar ið vóru fyrru helvt av 2018. Skaðaútreiðslurnar vóru 35,2 mió. kr. í fyrra hálvári 2019 samanborið við 37,4 mió. kr. sama tíðarskeið í fjør.

Bruttoendurgjaldsprosentið sigur sína søgu um skaðagongdina, og er 59,6% í fyrru helvt av 2019 samanborið við 68,1% sama tíðarskeið í fjør. Núverandi støði liggur á einari nøktandi legu.

Íløguvirksemið gav eitt undirskot á 0,2 mió. kr. fyrra hálvár í 2019 samanborið við 0,3 mió. kr. í halli sama tíðarskeið í fjør. Sera lága rentustøðið og varna íløgutilgongdin hjá Trygd ger tað trupult at fáa avkast í einum slíkum marknaði, men hetta er eitt tilvitað val og verður mett at vera nøktandi. Meginparturin av íløgufænum er sett í lánsbrøv við sera góðari flokking, og restin er vanligt innlán. Ongar íløgur verða gjørdar í partabrøv.

Rakstrarkostnaðurin fyrru helvt av 2019 samsvarar við væntanirnar og er á sama støði sum sama tíðarskeið í fjør. Hetta verður mett at vera nøktandi, og tá ið havt verður í huga, at virksemið hjá Trygd er vaksandi, er hetta eitt tekin um, at fyritøkan áhaldandi gerst effektivari.

Endurtryggingarnar verða gjørdar eftir sama leisti sum undarfarin ár, og skipanin, sum Trygd hevur lagt seg eftir, lagar seg støðugt eftir tilgongdini av kundum og hækkandi virðum.

Skatturin av hálvárliga úrslitinum hjá Trygd fyri 2019 verður roknaður at vera 1,3 mió. kr.

Tilsamans hevur Trygd rentað eginpeningin við 7,7% í fyrru helvt av 2019.

Leiðslan fegnast um góðu gongdina, herundir við góðum inntøkuvøkstri. Góða spjaðingin millum ymsar bólkar av tryggingum, umframt millum privatar og vinnuligar kundar, verður mett at vera góð og eitt gott grundarlag frameftir. Eisini fegnast leiðslan um, at tá Trygd hevur eitt gott úrslit, fær fyritøkan stimbra seg til at standa sterk ímóti møguligum komandi stórum skaðum.

## Eginpeningur og solvensur felagsins

Tann 30. juni 2019 var eginognin 82 mió. kr. Partapeningin, ið er 40 mió. kr., eigur P/F BankNordik.

Nýggj roknskaparkunngerð kom í juni 2018, og hevur virknað frá 1. Januar 2019. Kunngerðin førur við sær broytingar í nýttum roknskaparhátti. Broytingin viðvíkjandi váðaíkast ávirkar eginognina, og merkir at frá 1. januar 2018 er eginogn felagsins minkað við samlað 4,6 mió. kr.

Við virknað frá 1. januar 2019 er nýggj solvenskunngerð eisini sett í gildið. Trygd hevur gjøgnum fyrra hálvár 2019 latið inn uppgerðir um individuellan solvens til Tryggingareftirlitið. Uppgerðin um individuellan solvens, ið er neyðugur í sambandi við virksemi felagsins, er nakað lægri enn bókaða eginognin.

Individuella solvenskravið pr. 30.06.2019 var kr. 51,8 mió. kr., meðan kapitalgrundarlagið til at uppfylla solvenskrøvini var 79,7 mió. kr. Hetta vísir, at solvensurin er lutfalsliga góður og er á einum støði, ið leiðslan er nøgd við.

Solvensdekningurin pr. 30.06.2019 var 1,54. Niðanfyri sæst solvensdekningurin árini 2015-2019.

| | 30.06.2019 | 30.06.2018 | 30.06.2017 | 30.06.2016 | 30.06.2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvensdekningur** | 1,54 | 1,59 | 1,64 | 1,87 | 2,4 |

Solvensurin er gjørdur upp eftir nýggju solvens II reglunum í 2019 og 2018. Fyri 2015-2017 er solvensurin gjørdur upp eftir gomlu reglunum, tí tað hevur ikki verið gjørligt at gera hetta upp eftir nýggju reglunum. Tí kunnu tølini fyri 2015-2017 ikki samanberast við tølini fyri 2018-2019.

## Útlit fyri seinna hálvár 2019

Leiðslan væntar, at inntøkurnar fara at hækka nakað meira í seinnu helvt av 2019, og at skaðarnir fara at halda verandi støði, tó árstíðarjavna fyri hægri skaðar á vetri.

Váðarnir fyri væntaða úrslitið restina av árinum eru í stóran mun gongdin á tryggingarmarknaðinum, har áhaldandi kappingin um kundarnar er hørð, einstakir stórir skaða sum kunnu henda og so veðrið, har tað ítøkiliga verður hugsa um stormskaðar.

Felagið væntar, at ársúrslitið eftir skatt verður millum 9-12 mió. kr., um gongdin heldur fram sum væntað.

## Aðrar upplýsingar

Ongar hendingar eru farnar fram síðan 30. juni 2019, sum hava avgerandi ávirkan á rakstur og fíggjarligu støðu felagsins.

# English section

## Management's report H1 2019

Developments in the first half of 2019 for Trygd have been positive and are characterised by increasing income.

Trygd reported a pre-tax profit of DKK 7.3m, which is significantly higher than in the same period last year, which was expected. In terms of comparison, the H1 2018 pre-tax result was DKK 1.5m and was significantly affected by large claims.

The technical result was DKK 7.5m in H1 2019 compared to DKK 1.8m in the same period in 2018. Large claims had a particular influence on the development in 2018.

Trygd is an important part of the insurance landscape for Faroese households. These last few years Trygd has increased its market shares in the corporate and institutional sectors significantly, and the relatively largest part of Trygd's income increase comes from corporate/institutional sectors.

The positive developments in Faroese society also have a positive effect on Trygd's activities. In particular, the continuing increase in car sales, various increased activities relating to the growing tourism industry such as rental cars, and the positive developments on the housing market, are what drives the increase in income.

Gross premium written has been steadily increasing these last years. Compared to the same period last year, it has now increased by DKK 5.2m and is now DKK 75.3m compared to DKK 70.1m in the first half of 2018.

Claims expenses are lower than in the H1 period in 2018. This is a combination of Trygd's increase in activities, including higher risk, but also a great decrease in relation to the large claims that characterised the first half of 2018. Claims expenses are DKK 35.2m in H1 2019 compared to DKK 37.4m in the same period last year.

Claims ratio indicates the developments in claims. The H1 2018 claims ratio is 59.6% compared to 68.1% in H1 2018. This is considered to be in a satisfactory range.

Financial income amounted to a loss of DKK 0.2m in H1 2019 compared to a deficit of DKK 0.3m in the same period in 2018. The low interest and the very cautious developments in Trygd's investments entails that it is difficult to achieve a profit in such a market, however this is an active choice and it is deemed satisfactory. The majority of the investment budget has been placed in high rated bonds and the rest in standard deposits. No investments have been made in shares.

TRYGD

Operating expenses for the first half of 2019 have remained on the expected level and remain the same as in the same period last year. This is deemed to be on an acceptable level considering Trygd's increasing activities. This is a sign that the company is becoming ever more efficient.

Reinsurance remains in the same program as the previous year and the program that Trygd has implemented is continually adapting to the increase in customers and increasing value.

Tax on the income for the first half of 2019 has been calculated at DKK 1.3m.

Overall, Trygd generated a return on equity of 7.7% in H1 2019.

The management is satisfied with the sound growth in income. The healthy diversification between the various branches of insurances and between retail and corporate customers is deemed good and a firm foundation going forward. The management is also happy to see that the good result allows the company to fortify itself to face possible large damage claims in the future.

## The company's capital structure and solvency

Shareholders' equity amounted to DKK 82m at 30 June 2019. The share capital of DKK 40m is wholly owned by P/F BankNordik.

Effective from 01 January 2019 new regulations for solvency came into effect. The change of regulation has a negative impact on the company's equity of 4.6 mDKK as of 1 January 2018

Trygd has through the course of 2019 submitted statements of individual solvency to the Insurance Authority of the Faroe Islands. The calculated individual solvency required for the company's current operations is substantially lower that the company's shareholder's equity. As of 1 January 2019, Trygd is encompassed by the new solvency regulations Solvency II.

The individual solvency requirement was DKK 51.8m on 30 June 2019 while the company's eligible Base Capital was DKK 79.7m. This confirms the company's relatively strong solvency ratio, of which the management is satisfied.

| | 30.06.2019 | 30.06.2018 | 30.06.2017 | 30.06.2016 | 30.06.2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Solvency Ratio** | 1,54 | 1,59 | 1,64 | 1,87 | 2,4 |

The Solvency is prepared according to the new Solvency II regulations in 2018 and 2019. For the years 2015-17 the Solvency is prepared according to the old rules and thus not comparable with 2018 and 2019.

## Outlook for the remaining of 2019

Management anticipates a further increase in revenue flows in the second half of 2019, and that the damage claims will maintain the current level, although seasonally offset for higher claims level during the winter.

The risks affecting the results for the last six months of 2019 are mainly the continuing fierce competition in the market, the potential occurrence of large claims and the severe weather which is primarily claims resulting from windstorms.

The competition between the insurance companies remains fierce and is expected to continue for the rest of the year. Trygd expects the full-year net profit to be around DKK 9-12m, if the developments continue as expected.

## Other information

No events have occurred since 30 June 2019, which are of material significance to the company's financial or operating position.

TRYGD

# Roknskapartøl / Financial Statement

## Rakstrarroknskapur / Income statement

| DKK 1.000 | 30.06.2019 | 30.06.2018 |
|---|---|---|
| Tryggingargjøld, brutto / Gross premiums written | 75.337 | 70.136 |
| Endurtryggingargjøld / Ceded insurance premiums | -6.635 | -5.404 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum / Change in gross provisions for unearned premiums | -14.596 | -13.784 |
| Broyting í endurtryggjaranna parti av avsettum tryggingargjøldum / Change in reinsurers’ share of provisions for unearned premiums | 1.113 | 477 |
| **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt / Earned premiums, net of reinsurance** | **55.219** | **51.424** |
| | | |
| **Renta av tryggingarvirksemi / Technical interest, net of reinsurance** | **-97** | **-56** |
| | | |
| Útgoldnar veitingar/ Claims paid | -41.972 | -33.503 |
| Endurgoldið frá endurtryggingum / Reinsurance recoveries | 1.580 | 2.615 |
| Broyting í avsetingum til endurgjøld / Change in gross provisions for claims | 5.767 | -4.869 |
| Broyting í váðaíkasti / Change in Risk margin | -538 | 512 |
| Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / Change in reinsurers’ share of gross provisions for claims | -57 | -2.175 |
| **Skaðagjøld f.e.r. / Claims incurred, net of reinsurance** | **-35.220** | **-37.419** |
| | | |
| Útveganarkostnaðir/ Acquisition costs | -9.315 | -8.681 |
| Fyrisitingarkostnaðir / Administrative expenses | -3.728 | -3.835 |
| Provisiónir og partar av úrslitum frá endurtryggjarum / Commission from reinsure | 651 | 413 |
| **Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt / Total insurance operating expenses, net of reinsurance** | **-12.392** | **-12.102** |
| | | |
| **Tryggingartekniskt úrslit / Technical result** | **7.510** | **1.848** |
| | | |
| Rentur og vinningsbýti v.m. / Interest and dividends, etc. | 771 | 495 |
| Virðisjavningar / Value adjustments of investment assets | -1.073 | -849 |
| **Úrslit av íløguvirksemi í alt / Income from investment assets** | **-302** | **-354** |
| | | |
| **Renta og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum / Interest and value adjustments of provisions** | **97** | **56** |
| | | |
| **Úrslit av íløguvirksemi aftaná rentu og virðisjavning av tryggingartekniskum avsetingum/ Return on investment activities** | **-205** | **-298** |
| | | |
| **Úrslit áðrenn skatt / Profit before tax** | **7.305** | **1.549** |
| | | |
| **Skattur / Tax** | **-1.315** | **-279** |
| | | |
| **Hálvársúrslit / Profit for the period** | **5.990** | **1.271** |

TRYGD

## Fíggjarstøða / Balance sheet

| DKK 1.000 | 30.06.2019 | 31.12.2018 |
|---|---|---|
| **Ogn / Assets** | | |
| Rakstrargøgn / Operating equipment | 618 | 721 |
| Bygningar til egna nýtslu/ Real property | 1.933 | 1.943 |
| **Materiell ogn í alt / Total tangible assets** | **2.552** | **2.664** |
| | | |
| Lánsbrøv / Bonds | 165.951 | 153.829 |
| **Aðrar fíggjarligar íløguognir í alt/ Investment assets** | **165.951** | **153.829** |
| | | |
| Endurtryggjaranna partur av avsettum tryggingargjøldum / Reinsurers' share of provisions for unearned premiums. | 1.113 | 0 |
| Endurtryggjaranna partur av avsetingum til endurgjøld / Reinsurers' share of provisions for unpaid claims. | 2.342 | 2.399 |
| **Endurtryggjaranna partur av avsetingum til tryggingaravtalur í alt / Total reinsurer's share of provisions for insurance contracts** | **3.455** | **2.399** |
| | | |
| Áogn hjá tryggingartakarum / Receivables from policyholders | 3.497 | 2.973 |
| Áogn hjá tryggingarfeløgum / Receivables from insurance companies | 432 | 478 |
| **Áogn í samband við beinleiðis tryggingaravtalur í alt / Total receivables** | **3.929** | **3.451** |
| | | |
| Útsett skattaogn / Deffered tax surplus | 1.046 | 1.022 |
| Tøkur peningur / Cash and cash equivalents | 15.666 | 13.047 |
| **Onnur ogn í alt/ Other assets** | **16.712** | **14.069** |
| | | |
| Rentur tilgóðar og innvunnin leiga / Outstanding interest and rent | 532 | 1.100 |
| Aðrar tíðarmarkinger / Other accrued income | 1.372 | 1.294 |
| **Tíðaravmarkingar í alt/ Total accrued income** | **1.904** | **2.394** |
| | | |
| **Ogn í alt / Total assets** | **194.502** | **178.807** |

| DKK 1.000 | 30.06.2019 | 31.12.2018 |
|---|---|---|
| **Skyldur / Equity and liabilities** | | |
| | | |
| Partapeningur ella ábyrgdarpeningur / Share capital | 40.000 | 40.000 |
| Framflutt úrslit / Retained earnings | 42.019 | 36.029 |
| **Eginogn í alt / Equity** | **82.019** | **76.029** |
| | | |
| Avsett tryggingargjøld / Gross provisions for unearned premiums | 53.410 | 38.814 |
| Avsett endurgjøld / Gross provisions for claims | 43.812 | 49.336 |
| Váðaískoyti á skaðatryggingaravtalum / Risk margin | 6.156 | 5.618 |
| **Avsetingar í alt / Total techincal provisions** | **103.379** | **93.768** |
| | | |
| **Skuld / Debt** | | |
| Skuld í sambandi við endurtrygging / Debt related to reinsurance | 112 | 1.279 |
| Beinleiðis skattur / Tax | 2.779 | 1.441 |
| Onnur skuld / Other payables | 6.121 | 5.855 |
| **Skuld í alt/ Total debt** | **9.011** | **8.575** |
| | | |
| **Tíðaravmarkingar / Accruals and deferred income** | **94** | **435** |
| | | |
| **Skyldur í alt / Total equity and liabilities** | **194.502** | **178.807** |

TRYGD

| Broyting í Eginognsuppgerð / Statement of changes in equity | Partapeningur / Share capital | Flutt úrslit / Retained earnings | Uppskot til vinningsbýti / Proposed dividends | Eginogn / Equity |
|---|---|---|---|---|
| **Eginogn 1. januar 2018 / Shareholders´equity at january 1, 2018** | **40.000** | **33.919** | **0** | **73.919** |
| Broytingar í nýttum roknskaparhátti pr. 1 januar 2019 / Adjustments in accounting policy at January 1, 2018 | 0 | -4.607 | 0 | -4.607 |
| **Broytt Eginogn 1. januar 2018 / Adjusted Shareholders´equity at january 1, 2018** | **40.000** | **29.312** | **0** | **69.312** |
| Rørslur á eginogn í 2018 / Movements on equity in 2018 | | | | |
| Ársúrslit / Net profit | 0 | 6.716 | 0 | 6.716 |
| Útgoldið vinningsbýti - Paid dividends | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Eginogn 31, desember 2018 / Shareholders´equity at Desember 31, 2018** | **40.000** | **36.029** | **0** | **76.029** |
| **Eginogn 1, januar 2019 / Shareholders´equity at January 1, 2019** | **40.000** | **36.029** | **0** | **76.029** |
| Rørslur á eginogn í 2018 / Movements on equity in 2019 | | | | |
| Hálvársúrslit / Net profit for the period | 0 | 5.990 | 0 | 5.990 |
| Útgoldið vinningsbýti - Paid dividends | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Eginogn 30, juni 2019 / Shareholders´equity at June 30, 2019** | **40.000** | **42.020** | **0** | **82.020** |

TRYGD

## Notur / Notes

### Nota 1 Nýttur roknskaparháttur

Roknskapurin er gjørdur sambært kunngerð nr. 4 frá 27. juni 2018 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og tryggingarhaldfelagsskapum. Nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur í mun til 2018 burtursæð frá niðanfyri standandi tillagingum í nýttum roknskaparhátti, sum eru gjørdar sambært nýggju roknskaparkunngerðini. Víst verður tí eisini til pettið um nýttan roknskaparhátt í ársroknskapið felagsins fyri 2018.

**Broytingar sambært nýggjari roknskaparkunngerð:**

**Váðaíkast**

Avsetingarnar til endurgjøld skulu sambært nýggju kunngerðini hava eitt váðaíkast. Broytingin av hesum hevur við sær eina neiliga ávirkan á eginogn felagsins pr. 1. januar 2018 á 5,6 mió. kr.

**Tryggingarteknisk renta**

Tryggingartekniska rentan verður eftur nýggju kunngerðini bert roknað við støði í tryggingargjaldstiltakinum, og afturdiskontera við EIOPA rentuni.

**Skattur**

Skattur av váðaíkastinum hevur við sær jaliga ávirkan á eginogn felagsins pr. 1. januar 2018 á 1,0 mió. kr.

**Diskontering**

Orsakað av broyttum diskonteringsásetingum eru framdar broytingar í framløgu av tryggingarteknisku rentuni og broytingar í diskonteringsrentuni í árinum av Avsetingum til endurgjøld. Framyvir verður nýtt renta, ið verður ásett av EIOPA.

**Aðrar broytingar**

Umframt broytingar í nýttum roknskaparhátti, eru gjørdar broytingar í framløguni av rakstri og skyldum. Nýggjar roknskaparupphæddir fyri váðaíkast og broytingar í váðaíkasti eru í framløguni.

Samanberingartøl í rakstri, fíggjarstøðu og 5 ára yvirliti eru tillagað broytta roknskaparháttin í hálvársfrásøgnini.

Tað hevur ikki verið gjørligt at tillaga høvuðs- og lyklatøl fyri tíðarskeiðið 2015–2017 í 5 ára yvirlitinum í mun til broytta roknskaparháttin.

### Grannskoðan ella gjøgnumgongd

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað ella gjøgnumgingin.

## Note 1 Basis of preparation of the H1 financial statements

The interim financial statements have been prepared in accordance with Executive Order No. 4 from 27th of June 2018 on financial reports presented by insurance companies and holding companies. The accounting policies are unchanged in respect to the Annual Report for 2018 with the exemption of the following sections below, which are due to the change in the Executive Order No 4. For reference see also the section with Accounting Policies in the 2018 Annual Report.

### Changes according to the new regulation

**Risk margin**

According to the new regulation, provisions for outstanding claims shall contain a risk margin. The change has a negative impact on the company's equity of 5.6 mDKK as of 1 January 2018.

**Interst rate from insurance activity**

The interest rate from insurance activity is only calculated from outstanding premium provisions according to the new executive order and discounted using the EIOPA discount yield.

**Tax**

Tax on risk margin has a positive impact on the company's equity of 1.0 mDKK as of 1 January 2018.

**Discounting**

Presentation of interest rate income from insurance activity and discounting yield has been changed, due to new discounting regulation. The discount yield is now set according to EIOPA.

**Other changes**

In addition to these amendments in the applied accounting policy, changes are made in the presentation of the income statement and in liabilities. These changes comprise of new accounting entries for risk margin and change in risk margin.

Comparative figures in the income statement, balance and key ratios are adjusted to changes in applied accounting policy.

It has not been possible to adjust main- and key ratios to changes in applied accounting policy for the period 2015– 2017 in the Five Year Summary.

## Audit and review

No audit or review has been done to this interim report by the internal or external auditors.

TRYGD

## Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent hálvársfrásøgnina fyri fyrra hálvár 2019 hjá Trygd P/F.

Hálvársfrásøgnin er gjørd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at hálvársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum og skyldum, fíggjarstøðuni tann 30. juni 2019 og úrsliti av virksemi felagsins fyri tíðarskeiðið 1. januar 2019 til 30. juni 2019.

Okkara fatan er, at leiðslufrágreiðingin inniheldur eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í Trygd P/F og fíggjarligu støðuni og eina lýsing av teim týdningarmestu váðunum og óvissu tættunum, sum kunnu koma at ávirka felagið.

Tórshavn, 30. september 2019

## Statement by the management

The Board of Directors and the Management Board have today considered and approved the interim report of P/F Trygd for the six months ended 30 June 2019.

The interim financial statements have been prepared in accordance the regulatory requirements and possible requirements from Trygd's Articles of Association or contracts.

In our opinion, the management's report includes a true and fair view of the company's assets and liabilities, and the balance sheet at 30 June 2019 and of the result of the company's operations for the period 01 January 2019 to 30 June 2019.

We consider the management's report to give a fair representation of the development of Trygd P/F and describes significant risks and elements of uncertainty that it faces.

Tórshavn, 30 September 2019

**Stjórn / Executive Board**

Brian Smedemark

**Nevnd / Board of Directors**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Turið Finnbogadóttir Arge<br>*Forkvinna / Chairwoman* | Árni Ellefsen | Rune Nørregaard | Christian Clemmensen |